# Innbrot í Gullhorninum

## Taskutjóvar gjørdu um seg í TB-húsinum á Tvøroyri og eitt innbrot í Gullhorninum vóru mest álvarsligu málini, sum løgreglan viðgjørdi um vikuskiftið

Leo Poulsen

Tað hevur verið eitt rímiliga friðarligt vikuskiftið hjá løgregluni kring landið.

Ein gamal bilur kolaðist upp í Hundsatabotni, men talan var um ein gamlan bil, sum eigarin hevði frámeldað í fjør. Bilurin varð tó stolin, men eigarin tímdi ikki at gera nakað við málið, og meldaði tað ongangíð til løgregluna, sum tískil ikki hevur leitað eftir bilinum.

Tríggir bilførarar vórðu tiknir fyria tkoyra við kenning, ein í Leynum, ein á Norðskála og ein á Eystara Ringvegi í Havn. Talan var í øllum trimum førum um menn.

Fríggjakvøldið varð ein maður tikin á flogvøllinum fyri at smugla hassj. Hann hevði goymt 200 gramm í einum bommpakka, men hassjhundurin hjá tollvaldinum snoddaði seg fram til hassjið, og maðurin varð handtikin og skuldsettur fyri smugling.

Ferðslupolitiið var úti leygarmorgunin og fýra bilførarar fingu klipp í kortið fyri at koyra ov skjhótt í Kaldbaksbotni.

Ein onnur hending við bili var á Norðskála leygarkvøldið, tá tað byrjaði at rúka ófort undir einum bili. Orsøkin var, at útstoytið var lappað aftur við tape, og tað gjørdist so heitt, at tað fór at rúka úr tí. Eingin skaði hendi tó, tá tað eydnaðist at basa tí eldi, sum kundi verið komin í. Talan var tí mest um royk.

### Taskutjóvar

Út móti morgni sunnumorgunin kom ein fráboðan til løgregluna á Tvøroyri um, at fleiri taskur vóru horvnar í TB-húsinum. Løgreglan tók eitt ungt par, og tá húsarannsókn var gjørd heima hjá parinum kom politiið fram á fleiri aðrar taskur eisini, sum vórðu stolnar í VB-húsinum á jóansøku.

Parið er nú skuldsett fyri stuldur.

Sunnumorgunin handtók politiið eisini ein gamlan kenning, sum var farin út við høglbyrsu og hevði skotið upp í luftina við henni. Tað stóðst eingin vandi av, men maðurin, sum eisini hevði kenning, er nú skuldsettur fyri brot á politiviðtøkurnar.

Leygarnáttina var eisini eitt innbrot framt í Gullhorninum. Innbrotsmenninir høvdu brotið hurðina upp, og innkomnir høvdu teir stolið einar 50-60 ringar, ur og aðrar prýðislutir umframt ein grindaknív.

Ringarnir vóru tó sýnislutir og tískil einki verdir, men urini og grindaknívurin hava ávíst virði. Eingi spor av týdningi vóru á staðnum, so løgreglan stendur mest sum á berum í málinum í løtuni.

Annars var tað vanliga talið av fullum fólki, sum politiið antin tók upp ella koyrdi heim, verður upplýst av politistøðini í Havn.

*leo@sosialurin.fo*



*Brotið var inn í Gullhorninum í Havn, har einir 50-60 sýnisringar, ur og ein grindaknívur varð stolið*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

# Ferðavinnan ikki slept upp á fjall

## Fríggjadagin hevði Ferðavinnufelagið fund við Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharra, nú fólk eru søgd upp, sum hava havt við ferðavinnu at gera. Landsstýrismaðurin vissaði tó um, at ongar funktiónir verða niðurlagdar

Leo Poulsen

Fyri smáum tveimum vikum síðani boðaði Uttanríkisráðið frá, at fleiri fólk fóru at verða uppsøgd í ráðnum. Millum annað varð mett, at hetta fór at gagna út yvir ferðavinnudeildina í ráðnum, og tað fekk Ferðavinnufelagið at taka stig til fund við uttanríkisráðharran.

Fundurin varð hildin fríggjadagin, og frá Ferðavinnufelagnum vóru Jákup Sverri Kass, formaður, og Henny á Líknargøtu møtt, saman við stjórunum í Atlantsflog, Magna Arge, og í Smyril Line, Rúna Poulsen.

Umframt Jørgen Niclasen sjálvan, vóru eisini Herluf Sigvaldsson og Súsanna Sørensen møtt fyri uttanríkisráðið.

– Stemningurin á fundinum var góður og positivur, men fyri okkum telur tað mest, at okkurt hendir skjótt, tí vit eru ógvuliga ótolin, sigur Jákup Sverri Kass.



*Jákup Sverri Kass er formaður í Ferðavinnufelagnum*

Hann sigur, at tey frá uttanríkisráðharranum fingu at vita, at ongar funktiónir verða niðurlagdar, men at tað fara at henda roteringar innanhýsir í ráðnum.

– Tað, sum vit halda hevur størstan týdning, er, at tann persónurin, sum hevur sitið og samskipað alt tilfar til og frá miðlunum, er uppsagdur, og tí óttaðust vit fyri, at hendan funktiónin fór at falla burtur. Men tað lovaði Jørgen Niclasen so ikki fer at henda, sigur Jákup Sverri Kass.

Hann sigur, at tað vigar so ógvuliga nógv meiri, tá eitt tíðindaskriv kemur frá tí almenna, í mun til, tá Atlantsflog ella Smyril Line sjálvi senda tilfar út. Eisini er tað av stórum týdningi, at tað er ein almenn funktión at taka sær av útlendskum tíðindafólkum, tá tey koma hendan vegin.

### Nógvar broytingar

Hin funktiónin innan ferðavinnudeildina er upplýsing um ferðavinnu í síni heild í Føroyum, og eisini hendan funktiónin verður varðveitt, sambært Jørgen Niclasen.

– Tað er neyðugt, at fólk situr á hesum funktiónunum, tí tað er av alstórum týdningi, at skjótt kann berast at, tá okkurt stingur seg upp, sigur Jákup Sverri Kass.

Hann vísir á, at tað eru hendar stórar og umfatandi broytingar innan ferðavinnuøkið hjá tí almenna.

– Vit høvdu fyrst Ferðaráð Føroya, sum síðani bleiv til Samvit, sum síðani gjørdist ein deild undir uttanríkisráðnum. Allar hesar broytingar ørkymla sjávlandi fólk í ferðavinnuni, og tá tað so nú frættist, at tey, sum sótu á hesum týðandi funktiónum fyri ferðavinnuna eru uppsøgd, so er tað klárt, at vit fegin vilja vita, hvat hendur í málinum, sigur Jákup Sverri Kass.

Á fundinum fingu umboðini fyri Ferðavinnufelagið lovað, at tá vinnan hevur temadag í Klaksvík fríggjadagin 10. september, kemur uttanríkisráðharrin við einum uppleggi um, hvussu ferðavinnan verður skipað frameftir frá almennari síðu.

– Tað er møguligt, at Ferðavinnufelagið kann yvirtaka onkrar funktiónir. Vit hava júst sett Dagmar Joensen í starv sum samskipara hjá ferðavinnuni í Føroyum, og tað er so ein tanki, sjálvt um eingin ávís funktión var nevnd á fundinum, sigur Jákup Sverri Kass.

Hann undirstrikar, at tað fyri vinnuna hevur stóran týdning at vita, hvat hendir næstu seks mánaðirnar, næsta árið ella tvey.

– Vit hildu tað vera eitt afturstig, tá fólkið, ið samskipaði ferðavinnutilfarið, varð flutt úr Danmark til Føroya, og fellur tann funktiónin heilt burtur, er tað eitt rættiligt bakkast fyri vinnuna, sigur Jákup Sverri Kass.

Men fyribils verður so bíðað til 10. september, tá Jørgen Niclasen greinar framtíðar ætlanir hjá tí almenna um føroyska ferðavinnu.

*leo@sosialurin.fo*